## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri, seinnapartin upp í hvassan vind av útsynningi. Stundum regn og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinnapartin nakað minni vidnur. Ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 0 og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum minus 2 og +2 stig.

# Látrið vitjar Miðlahúsið

**Við jøvnum millumbilum vitja skúlar og barnagarðar í Miðlahúsinum, og í gjár var tað barnagarðurin og frítíðarskúlin í Látrinum í Nólsoy, sum var á vitjan**

VITJAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tey vóru spent, tey 16 børnini í frítíðarskúlanum í Látrinum í Nólsoy, sum mánadagin vóru á vitjan í Havn.

Fyrst gekk leiðin í Vágsbotn í Miðlahúsið, har børnini við teimum báðum starvsfólkunum vórðu víst runt í húsinum, bæði á blaðdeild, teknisku deild og uppi í rásarúminum hjá Rás2. Børnini eru í skúlabólkinum og eru millum 6 og 9 ár.

Látrið er bæði vøggustova, barnagarður og frítíðarskúli, og til samans eru 33 børn á stovninum.

Børnini hava eitt ynski um at vitja ymiskar stovnar í Havn, og tað royna vit so eftir førimuni og sum veðrið er til. Í gjár vitjaðu vit umframt Miðlahúsið eisini Margarinfabrikkina og jólabýin í SMS, sigu Guðrun S. Hansen, leiðari á Látrinum.

Tey hava eisini verið og vitjað á eitt nú Politistøðini og á Brandstøðini.

Tey eru 9 starvsfólk tilsamans á Látrinum, men har skal vimerkjast, at summi bert hava nakrar fáar tímar um vikuna.




*Tey 16 børnini í frítíðarskúlanum í Nólsoy vóru og vitjaðu í Miðlahúsinum í gjár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 4 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 11 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 2 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 4 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 14 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 18 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 989 hPa. við Jan Mayen fer eystureftir og dýpist. Brúgvalagið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.



**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/11 kl. 06⁰⁰ – 19/11 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í november: -4,0° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 18/11 kl. 06⁰⁰ – 19/11 06⁰⁰.
Avfallið higartil í november: 38 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

14. novembur Mánin næstur jørðini
19. novembur Seinna kvarter
27. novembur Tendring
29. novembur Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 25. nov | 4:24 | 16:46 | 3:24 | 15:46 | 3:39 | 16:01 | 6:24 | 18:46 | 7:24 | 19:46 | 2:39 | 15:01 | 1:39 | 14:01 | 4:39 | 17:01 | 5:39 | 18:01 | 4:09 | 16:31 | 5:24 | 17:46 |
| 26. nov | 5:09 | 17:33 | 4:09 | 16:33 | 4:24 | 16:48 | 7:09 | 19:33 | 8:09 | 20:33 | 3:24 | 15:48 | 2:24 | 14:48 | 5:24 | 17:48 | 6:24 | 18:48 | 4:54 | 17:18 | 6:09 | 18:33 |
| 27. nov | 5:57 | 18:21 | 4:57 | 17:21 | 5:12 | 17:36 | 7:57 | 20:21 | 8:57 | 21:21 | 4:12 | 16:36 | 3:12 | 15:36 | 6:12 | 18:36 | 7:12 | 19:36 | 5:42 | 18:06 | 6:57 | 19:21 |
| 28. nov | 6:46 | 19:12 | 5:46 | 18:12 | 6:01 | 18:27 | 8:46 | 21:12 | 9:46 | 22:12 | 5:01 | 17:27 | 4:01 | 16:27 | 7:01 | 19:27 | 8:01 | 20:27 | 6:31 | 18:57 | 7:46 | 20:12 |
| 29. nov | 7:37 | 20:03 | 6:37 | 19:03 | 6:52 | 19:18 | 9:37 | 22:03 | 10:37 | 23:03 | 5:52 | 18:18 | 4:52 | 17:18 | 7:52 | 20:18 | 8:52 | 21:18 | 7:22 | 19:48 | 8:37 | 21:03 |